**Spurningar og svar til útboðið:l Rammusáttmáli dekk og oljuskift til bilar hjá Almannaverkinum (dagført)**

**Spurningar 1:**

2.4 Er innskanning av tilboðnum ok at senda sum teldubræv?

Gangi út frá, at feilur er í dagfestingini "fríggjadagin 21. August kl 12"

**Svar 1:**

Ja, til ber at skanna tilboðið sum teldupost.

Eina freistin í tilfarinum er skeiv. Tann rætta er upplýst síðst í útbjóðingartilfarinum og á keypsportal.fo, sum er 07-09-2026 12:00.

---

**Spurningur 2:**

3.1 Meginøkinum: er tað økini, har koyrandi er til?

**Svar 2:**
Meginreglan er at øll akfør hjá Almannaverkinum í miðstaðarøkinum eru umfataði av útboðnum. Mett verður, at talan er um 100 akfør. Meginøki skilja vit sum Tórshavn, og tilhoyrandi bygdir/býir

---

**Spurningur 3:**

3.3.2 Skal verkstaðið innkallað ávísu bilarnar, ella siga tit frá, tá teir t.d. hava tørv á oljuskift ella annað?

**Svar 3:**
Verkstaðið skal sum meginregla innkalla akførini, men stovnar kunnu gera aðra avtalu

---

**Spurningur 4**

3.3.4 Fremstu raðfesting - tit meina væl í vanligari arbeiðstíð?

**Svar 4:**
Fremstu raðfesting í vanligari arbeiðstíð.

---

**Spurningur 5**

5.3 Skilji ikki innihaldið í síðsta reglubrotinum. Hvat meinast hetta við, tá vektingin er 100% prísur?

**Svar 5:**

At prísur telur 100 prosent.

---

**Spurningur 6:**

5.5 Tilboðsfreist fríggjadagin 07. September kl 12. Her er feilur í - nær er freistin?

**Svar 6**

Eina freistin í tilfarinum er skeiv. Tann rætta er á niðast í útbjóðingartilfarinum og á keypsportal.fo, sum er 07-09-2026 12:00.

---

**Spurningur 7:**

Tilboðsskjalið:

Dekk til Skoda Fabia. Hvørja støðd skulu vit bjóða uppá? Teir brúka ymiskar støddir.

**Svar 7:**

185/65 R15

---

**Spurningur 8:**

Hvat eru støddirnar á dekkunum á bilunum, ið skulu skifta dekk? Bilarnir kunnu hava fleiri ymiskar støddir. Ynskist eitt samlað prísyvirlit fyri allar støddirnar? Skoda Fabia td. kann brúka alt frá 15-17' dekk og tað er sera stórur prísmunur á støddunum.

**Svar 8:**

Listi við akførunum er hjálagdur. 185/65 R15 er støddin á Skodia Fabiu bilunum.

---

**Spurningur 9:**

Hvussu nógv dekk eru fevnd av útbjóðingartilfarinum? Í príslistanum verða stk. nýtt sum eind, men er talan um stk (bilar) ella stk (dekk).

**Svar 9:**

Per akfar. Tað vil siga at fýra dekk skulu skifast per stk.

---